# Bin Laden má ikki kn



*Bogi Eliasen*
*cand.scient.pol*

## Altjóða yvirgangur

Yvirgangur hevur verið ein partur av heimsmyndini í nógv ár, men altjóða yvirgangurin er ikki rættiliga komin fyri seg fyrrenn í hesi øldini. Ein orsøkin er meira framkomna og viðbrekna samfelagið, sum ger tað møguligt at gera stóran skaða við rímiliga einfaldum vápnum. Nógv verður tosað um, at talan í dag er um altjóða yvirgang. Yvirgangurin verður í dag ikki bert framdur í økinum, har yvirgangsmennirnir ynskja broytingar. Al-Qaeda vil hava vesturlendska ávirkan burtur frá muslimsku londinum, sum teir siga verða rænd. Yvirgangsmennirnir vit higartil hava sæð í vesturlondunum, eru tó ikki fólk búsitandi í hesum londum, men fólk sum búgva í fyrstaheimslondum. Ein bretskur imanur, segði herfyri sambært BBC, at nógvir muslimar gerast fanatiskir í fongslunum í Bretlandi. Hetta nemur við trupulleikar, sum mugu takast fram í samband vid kríggið ímóti yvirgangi. Manglandi integratiónin í nógvum av ríkaru londunum ger, at partur av muslimunum kenna seg útihýstar av samfelagnum. Hetta ger, at ístaðin fyri at gerast partur av samfelagnum teir eru komnir til, lata bólkarnir seg aftur og leita aftur til átrúnaðin og mentanina, sum teir eru komnir frá. Harafturat eru bólknarnir vitni til, at lond teirra liggja í andaleypi, bæði orsakað av vesturlendskari ávirkan serliga tey seinastu 100 til 150 árini, men eisini av harðrendum leiðarum. Einstaklingarnir, sum onkuntíð eru fyrsta ættarlið av innflytarun, men eisini annað og triðja, kenna seg ikki góðtiknar sum part av samfelagnum teir búgva í, og duga heldur ikki at síggja at teir hava nakað annað at fara til. Al-Qaeda ynskir eisini at sleppa av við mutraðar leiðarar í Miðeystri, bin Laden hevdi einki gott at bera Hussein. Júst tað at tosað verður um 3. ættarlið av innflytarum, sigur eitt sindur um hvussu torført tað er at gerast samrunnin partur av einum samfelagi. Sum íslendski vinmaðurin Atli spurdi donsku lestrafelagarnar, *"hvis man kan være 3. generations indvandrer, hvornår fanden bliver man så dansker?"*

Ein stórur spurningur er, hvussu stóran veruligan stuðul al-Qaeda hevur. Tí rætt er, at bólkurin megnar at útinna ræðuligar atsóknr við jøvnum millumbili, men tað sær ikki út til at hann megnar meira enn tað.

## Islam er kollveltandi

Islam er vorðið kollveltandi, tað er her ónøgdin verður sett í bás. Rákið elvir til broytingar í samfeløgum okkara, tí kollveltingarsinaðir islamistarnir stríðast eisini fyri at umvenda kristnu londini. Í donsku fjølmiðlunum bleiv herfyri víst á, at fleiri ungir danir konvertera til islam og at hetta skal síggjast sum ein ungdómsuppreistur. Hetta verður brúkt sum provokation, eins og kommunisman var fyrr. Tí meta summi, at undirtøkan fyri islam kann sammetast við kolveltingarsinnaðu kommunistarnar í 60'unum og 70'unum.

## Kolveltandi broytingar

Vit tosa nógv um alheimsgerðina og allar tær broytingar hon hevur við sær. Tað er rætt, at alheimsgerðin broytir heimin, men vit geva okkum ov lítið far um, hvussu stóra broyting ógvusligu yvirgangsatsóknirnar hava havt. Hart vunnin mannarættindi verða skúgva til viks, og myndugleikar tykjast vilja pantseta partar av frælsa fólkaræðinum í stríðnum ímóti altjóða yvirgangi, sum ikki minst kom til sjóndar í "shoot to kill" politikkinum hjá Metropolitan Police í London, tá ein brasilskur unglingi uttan ávaring bleiv skotin sjey ferðir í høvdið. Tað hevur seinni víst seg, at maðurin einki hevði við yvirgang at gera.

Vit leggja ikki so væl merki til tað í gerandisdegnum í Føroyum, men kring vesturheimin hava muslimar og serliga fólk úr Miðeystri strong kor. Rasisman sum var áðrenn hetta slagið av yvirgangi tók seg upp, er vorðin nógv verri.

Eg fari her at royna at taka nakrar høvuðshendingar fram um hetta evni seinastu árini, sum vísir okkum, hvussu nógv hesar hendingar hava skakað og broytt okkum.

## Yvirgangur ikki nýtt

Yvirgangur og yvirgangsatsóknir er ikki eitt nýtt fyribrygdi, men mátin altjóða yvirgangurin nýtir nú, hevur kanska størri ávirkan enn nakrantíð. Orsakirnar eru fleir, bæði tí heimurin í dag er vorðin minni við atgongd til tøkni. Lætt er at ferðast kring heimin, skjótt samband kann haldast við fólk umvegis telefon, teldutøkni, út- og sjónvarp. Tøkniligu frambrotini gera, at nógv meira umfatandi samskifti og ferðing fer fram, og samstundis at hetta verður gjørt í eini rímiligari frælsari skipan. Eftirlit er, soleiðis at t.d. amerikanska fregnarstænastan CIA, kann byrgja fyri atsóknum ímóti amerikonskum áhugamálum, men alt verður ikki kannað, tí so fer dynamikkurin úr skjótleikanum í okkara tøkniligu frambrotum.

## Røkkur víða

Kunningartøknin ger, at yvirgangsforsprákarar, sum t.d. Osama bin Laden, kunnu røkka víða við sínum boðskapi, uttan at skula at verða á staðnum. Soleiðis kann hann boða sín boðskap og samstundis fjala seg fyri amerikumonnum. Við at brúka kunningartøknina er eisini lættari at fáa nógv fólk at taka undir við hansara hugsjón. Hóast tað neyvan er ein stórur procentpartur í nøkrum landi, sum veruliga stuðlar bin Laden, so fær hann fatur á samhugsandi kring knøttin, sum bumbuatsóknirnar í London eru prógvið um. Hesar hava eisini skakað vesturheimin, tí tað tykist ikki sum at bumbumennirnir hava havt nakað beinleiðis samband vid bin Laden ella hvønn annan, og tað sigur okkum so mikið, at talan ikki bert er um at net av yvirgangsmonnum, men um eina rørslu, har smáir bólkar ella einstaklingar sjálvir taka stig til yvirgangsatsóknir, hetta við íblástri frá bin Laden og teim sum boða hansara boðskap. Bin Laden brúkar somuleiðis tøknina til at savna alla arabiska átrúnaðarliga samleikan, til tess at berjast ímóti vesturheiminum í Afghanistan, Irak og aðrastaðni kring heimin.

## Bretland útvísir

Bretland hevur longu tikið avleiðingina av hesum og vísir av landinum imanar (muslimskir prædikumenn) sum prædika soleiðis, at tað kann skiljast sum ein stuðul til at fremja yvirgangsatsóknir. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av at muslimskir bretar sprongdu og royndu at spreingja bumbur í London. Bretland hevur í tíðir annars verið plágað av sama trupulleikanum, tí IRA hevur skipað fyri fleiri atsóknum. Í Danmark er eisini komið eitt uppskot um at kunna taka ríkisborgararættin frá fólki, sum gera slík lógarbrót. Spurningurin er so bara hvar tey so skulu fara, tí Danmark loyvir ikki duppultum ríkisborgararætti?

## Irak

Tað er lítil ivi um, at ein partur av uppreistrarmonnunum í Irak hava fullan stuðul frá bin Laden, eins og Bin Laden var hollur stuðul hjá Talebanunum í Afghanistan. Serliga víðgongdu sunnimuslimar tykjast at taka undir við bin Laden. Hesir hava tikið sær stórt vald í Irak í dag, og vandi er fyri, at um irakar ikki semjast um ein grundlógarleist, endar tad við borgarakríggi.



*Hann fekk Saddam vekk, men fær han skil á Irak?*



*Saddam er ein búrkroppur, men fyri nógvan irakar er støðan ikki betri í dag*

Tað er í øllum førum greitt, at sameinda hermegin og fyribilsstjórnin í Irak ikki hava valdið í øllum landinum, og at uppreistrarbólkarnir ikki fara fram við mýkingum, har teir ráða fyri borgum. Í skrivandi løtu, er seinasta upskotið júst sent til partarnar.

## Ávirkan á vesturlond.

Endamálið við yvirganginum hjá Al-Qaeda er at skaka vesturheimin, at fáa hesi londini at taka seg burtur úr muslimska heiminum,. og eisini at fáa fastatøkur í vesturheiminum. Tað sum ger, at tað ber til at koyra andaligu herferðina, er partvíst tí at flestu av hesum londunum hava verið hjáveldi hjá vesturevropeiskum londum, og handilsliga hava vesturlond enn stóra ávirkan og tí eisini eina undirbrotligheit, serliga nú hesar mentanir, sum vóru sera frammaliga, eru farnar niður á bakka seinastu 100 árini. Og frá at hava havt stoltar heimsmiðdeplar, at verða menningarlond eyðkend av einaræði, órættvísi og fátækradømi. Soleiðis er endamálið hjá bin Laden at fáa muslimar at standa saman, at